# Losjan Støt Viljen 100 ár

**Bókin um losjuna »Støt Viljen« í Havn í 100 ár er eitt bókaverk á 375 síður, sum lýsir søguna hjá Losjuni í Havn, sum varð stovnað hin 1. mai í 1902**



*Erling Isholm hevur skrivað søguna um Losjuna í Havn, sum forlagið hjá Losjuni, Mál & Mentan hevur givið út*

## SØGAN UM LOSJUNA

Losjan Støt Viljen er av teimum flestu kend undir felagsheitinum NIOGT. Í bókini verða eisini losjurnar og ungmannadeildinar annars kring oyggjarnar lýstar.

Rættuliga neyvt lýsir bókin partar av siðsøgu okkara og innlit í felgaslív, sum tað var í øldini farnu í tíðarbilum, tá samfelagið var rættuliga lítið øðrvísi, enn tað hevði verið í øldir - serliga ferðalíkindi, samband millum bygdir og oyggjar.

Greitt verður frá stovnaranum, Laurits Henriksen og tí risaarebiði, sum hann legði í losjuna tey fyrstu árini. Dentur verður eisini lagdur á at lýsa, hvussu fólkaatkvøðan í 1907 fekst í lag, og hvat losjan gjørdi fyri at fáa eitt so gott úrslit sum gjørligt burtur úr henni. Væl varð arbeitt, tí fólkaatkvøðan endaði við, at Føroya fólk við stórum meiriluta samtykti at banna rúsdrekkasølu í landinum. Síðani hevur ættarlið eftir ættarlið verið virkið í losjuni í Havn alla síðstu øld.

Í 1936 varð Ungmannadeildin hjá losjuni Støt Viljen sett á stovn, og við henni gjørdist losjan eitt tað virknaðasta felagið í Havn í útvið tríati ár. Í sekstiárunum bygdi losjan ein nýggjan bygning á Tinghúsvegnum, og hesa somu tíðina vann føroyska goodtemplararørslan sær pláss millum aðrar í altjóða samstarvi.

Í 1973 keypti losjan Uppistovu, sum gjørdist eitt vældámt stað hjá bæði børnum, ungum og gomlum í sjeyti- og áttatiárunum.

Hetta eru alt partar av hesi lýsing av fyrstu 100 árunum hjá losjuni Støt Viljen.

Stórt tal av myndum lýsa viðurskifti, sum tey tá vóru.

Skrá yvir kunninganotur, keldur, navnalisti, listi yvir myndaánarar er viðskeri, ið ger bókina áhugaverda, eisini sum gott hjárit á bókahyllini.

Bókin kostar 325 krónur í sjáldsama fagurlittari permu.

Rithøvundur er Erling Isholm, og Forlagið Mál & Mentan hevur givið út.

## Eigur at koma í tingi og í skúlar

Í ummæli sínum í FF-Blaðnum skrivar Óli Jacobsen um bókina, at hon er eitt megnarverk, sum lýsir eina søgu, sum ikki so nógv er gjørt burturúr.

» – Tað kann verða nevnt her, at rættlesarin av bókini Hanus Samuelsen hevur sagt, at hann var eins hugtikin av bókini seinnu ferð, hann las rættlestur, sum fyrru ferð.

Bókin hevur uppiborið stóra útbreiðslu heilt frá tingi til skúla. Skúlarnir eiga at útvega sær minst eitt klassasett, so allir næmingar kunnu seta seg inn í, fyri tað fyrsta hvussu skaðiligt tað kann vera við rúsdrekka, og ikki minni fyri at kunna seg um menn og kvinnur við hugburði, sum ofraðu seg fyri eini sak. Vit hava nevniliga brúk fyri slíkum fólki eisini í framtíðini, og tey eiga at kunna fáa íblástur í skúlanum. Tað er har tað skal byrjast«, skrivar Óli Jacobsen, sum leggur afturat, at hetta er í hvussu er ein góð jólagáva…


FÆST UM ALT LANDIÐ

SKIPALISTIN 2006 hevur alt til tey, ið hava áhuga fyri skipum og sjógvi

- lógarkravdur føroyskur álmanakki
- streymtalvur og streymkort
- radiosamskifti og neyðhjálp
- sigliljós
- kort

og besta og mest álítandi Skipalistan við hópin av dagførdum og viðkomandi upplýsingum.

SKIPALISTIN er fremstur við dagførdum og álítandi tilfari.






einans 149,-

www.skipalistin.fo

Ein hent jólagáva

SKIPALISTIN hevur lógarkravdan føroyskan álmanakka